

# Reyðargullið á SvF

**Fyrsta sendingin í røðini, Reyðargullið, hjá Zakarias Hammer varð send seinasta sunnukvøld á SvF. Hetta er ein sera forvitnislig og søguliga dokumenterandi røð um ein týðandi part av Føroya fiskivinnusøgu, nevnliga um rækjuvinnuna — ein vinna, sum í løtuni hevur tað sera trupult. Men Varpið fekk eitt lítið prát við mannin, ið eftir hondini hevur gjørt fleiri sera væl dámdar føroyskar sendingar.**

**Vetrarskráin hjá SvF**
Nú tað er vorðið kaldari í veðrinum og tað nú fyrri tekur at myrkna, er SvF av álvara farið undir vetrarskránnað. Her eru fleiri serliga fleiri áhugaverdar føroyskar sendingar at síggja. Fyri uttan Reyðargullið eru barnasendingarnar Garasjan, mentannarsendingin Mentannartíðindir, ítróttarspurnarkappingin við Leivi Hansen Lið um Lið, ítróttarsendingin 3-2, Okkara Kokkar og trýparta dokumenterandi sendingin Undan væðingini, sum verður send hesa vikuna, nakað av tí føroysku sjónvarpshyggjarar hava møguleikan at gera sær dælt av komandi veturin.

**Reyðargullið — partur 2**
Hesin parturin kallast Møguleikar og kvotur. Í sjeyti árunum vaks rækjuveiðan í Vesturgrønlandi skjótt, og aðrir - russar, norðmenn, danir, spaniólar og grønlendingar sjálvir - vildu fáa part í hesum gullnáminum, sum føroyingar høvdu funnið. Í hesum partinum kemur av álvara politikkur uppí spælið. Fyrsti parturin snúði seg um fyrstu rækjuárini í Grønlandi. Tað var í 1969, at mann fyri fyrstu ferð royndi á opnum havi eftir rækjum. Tað var John Dam, sáli, skiparin og reiðarin, ið førdi hekkutrolaran Vesturvarðan, sum var tann fyrsti at trola eftir rækjum á opnum havi. Tá var tað hildið at vera óðamannaverk at fara út á opið hav, at royna eftir hesum lítla reyða krabbadýrinum, virka rækjurnar og so til síðst at fáa tær út á marknaðin. Hetta, at royna eftir hesi marsfluguni, sum mann kallaði rækjuna tá, kundi ikki fara at bera seg, varð mett. Men, hetta gjørdist eitt stórsligið frambrot í føroysku fiskivinnuni. Fyrsti parturin leggur seg eftir árunum fram til 1976.
Í 1976-77 komu fyrstu drúgvu og hørðu samráðingarna um kvotuáseting. Politikkur kom av álvara uppí rækjuvinnuna, hetta merkir annan part í dokumentarsendirøðini hjá Zakarias. Í hesum samanhanginum førir John Dam fram, at føroyingar mistu alt ov nógv rættindir, tá ein hugsar um, at vit og grønlendingar eru saman í ríkisfelagsskapinum. T.d fingu norðmenn meiri enn føroyingar fingu. M.a. er grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonatan Motsfeldt, við í sendingini og hevur sínar viðmerkingar til málið.

**Zakarias Hammer**
-100 tímar av filmsupptøkum - niður í uml. 5 tímar
-Sjónvarp skal eisini vera eitt upplivilsi! Endamálið hjá mær við sendirøðini er at samantvinna eina søguliga djúpd við eina frásøgn við sera livandi myndum.
Zakarias Hammer er maðurin, ið hevur tikið umleið 100 tímar av filmsupptøkum ið verða brúktar til hesa sendirøðina. Av øllum hesum tímunum eru tað bara umleið fimm heilir tímar, sum verða brúktir, so tað er nógv sum er skorið burtur. Hetta sigir Zakarias mangan vera sera trupult, at verða noyddur at skera sumt burtur. Síðan 1979 hevur Zakarias fingist við at taka livandi myndir og hann hevur fingið fleiri viðurkenningar fyri hansara nógva, væl dámda og týdningarmikla arbeiði. M.a. hevur hann fingið M.A. Jacobsens virðislønina fyri hetta arbeiði.
Ein kann siga, at tað var í 1996 at Reyðargullið byrjaði — her byrjaðu upptøkurnar av tí, sum er blivið til hesar sendingarnar, ið kunnu síggjast tey komandi sjey sunnukvøldini í vetur.
Hugskotið til gera Reyðargullið er komið so líðandi, sum hann hevur verið við rækjubátum. Frá 1996 og 2003, til dagin í dag, hevur hann fingist við rækjuveiðuna, antin um tað er umborð á ymiskum rækjutrolarum ella aftanfyri upptøkutólið á øðrum støðum. Sostatt hevur hann fingið ein serligan áhuga fyri hesi munavíst nýggju vinnuni.
Zakarias søkti um farloyvi frá Sjónvarpi Føroya á heysti í 1996 og fór við rækjutrolaranum Gilstón sum royndi í Eysturgrønlandi. Her vóru mangar minniligar løtur, sigur Zakarias frá, og fleiri av hesum løtunum komu uppá film.
-Jú, her fekk eg einar 20 tímar uppá band og her fekk eg fleiri sterkar livandi myndir. Ofta leikaði tað hart á úti á dekkinum og eg hevði upptøkutólið við harút. T.d. lógu vit fastir í eini 2-3 samdøgur í ísinum og royndu at koma leysir — mest sum allir føroyski rækjuflotin, sjey bátar — og hjálptu hvørøðrum. Farvatnið har er ikki bara at spæla við. Men har komu fleiri minniligar og vakrar løtur á film.
Í 1997 var Zakaris á Flemish Cap og upptøkutólið var sjálvandi við. Her var hann í eitt hálvt ár. Her var hann eisini umborð á øðrum føroyskum trolarum. Her komu umleið 70 tímar í kassan.
Í 2001 fór hann við Sólborg sum kokkur og fekk, ímillum vaktirnar, tikið myndir og fylgt upp, tí arbeiðinum hann frammanundan hevði gjørt. Við Sólborg kom hann aftur til Kanada og her var nógv broytt. Hetta var sera spennandi og hóskaði væl til heildina á sendirøðini - eina ávís útvikling var farin fram í rækjuflotanum. Sólborg er seinasti báturin, sum Zakarias hevur verið við.

**Slóðbrótandi virksemi**
Hetta er ein sera hugtakandi partur av føroyskum vinnulívi — ein heimur, ið fleiri føroyingar kenna lítið til. Ein sera spennandi verð í Norðuratlandshavinum, har fleiri spenningar gera seg galdandi og nýggjar leiðar hava verið royndar. Hetta fær ein eisini fatanina av, tá ein prátar við Zakarias Hammer um hesa vinnuna.
-Jú, talan er veruliga um slóðbrótandi virksemi og hetta er sera spennandi. Føroyingar royndu seg sum teir fyrstu á fleiri fjarleiðum og millum aðrar stórtjóðir. T.d. hava kanadiumenn lært eina rúgvu um rækjuvinnu av føroyingum.
Onkur skemtilig søgu er sjálvandi inn ímillum. T.d. sigur Kjartan Joensen frá, tá teir seldu ta fyrstu lastina í 1970. Hetta var jú í 1970 og fyrstu ferð, so her var neyðugt at taka óvanligar søluhættir í brúk, talan var um nakrar taksabilar við bagasjurúmið fullfermt av rækjum, ið koyrdu nógv runt í býnum.
John Dam er pionerurin og ein høvuðsmaður í rækjusøgu Føroya — hann gongur aftur í fleiri av sendingunum.
— Eftir at eg hevði fingið eitt tveir tíma langt prát við John var upplagt at hetta prosjektið bleiv til veruleika, so einaferð í summar hugsaði eg, nú skal tað verða!
Tað sær ikki mætari út enn at hendan dokumentarsendirøðin um føroysku rækjuvinnuna er sera viðkomandi. Støðan, sum rækjuvinnan stendur í, er sera trupul og hættislig. Og á SvF er talan um at gera eina serliga kjaksending seinni í vetur um hetta evnið.

**Reyðargullið 2 — møguleikar og kvotur, á SvF sunnukvøldið 12. kl. 20.00**